# Faroe Travel: Rokan í fjøruni



Vit eru í tíðini, har tú kanst byrja um, hvussu tú skalt nýta tína frítíð. Dánjal Poulsen er stjóri í Faroe Travel, og hann sigur, at summarvirksemið hjá ferðaráðnum er veruliga byrjað nú. Nógv byrja at tilrættisleggja sína feriu í apríl-mai. Vøksturin av teimum um ferðandi um flogvøllin hevur verið 9% í ár.

– Vit hava upplivað ein søguligan vøkstur tey síðstu árini. Tað eru fleiri, sum nýta ferðaráðini til at velja feriu. Okkara starvsfólk hava eina vitan, sum kann tryggja, at okkara kundar fáa eina góða feriu, sigur Dánjal Poulsen.

Mestsum allir kundarnir ferðast um Keypmannahavn, sum er vorðin ein "gateway". Av teimum meira forkunnugu ferðamálunum eru londini í miðalhavinum best dámd. Møguleikarnir eru fleiri, og um tú ynskir at uppliva sól og summar, so skalt tú bara stíga inn á gólvið hjá Faroe Travel.

**- HeiniK**



















